UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Dagfesting: **24. august 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-143**

Svar

upp á

§ 52a fyrispurning nr. 52-010/2022 frá Bjarna Kárasyni Petersen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni, um stuðul og útflutning til Ukraina

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvørjar eru yvirskipaðu umstøðurnar fyri útflutning av føroyskum vørum til Ukraina?
2. Hvør er gongdin fyri útflutning av føroyskum vørum og tænastum til Ukraina?
3. Er grundarlag fyri at stuðla Ukraina búskaparliga við størri útflutningi av føroyskum vørum og tænastum?
4. Eru markaforðingar fyri útflutning av føroyskum vørum og tænastum til Ukraina?
5. Hvussu stórur partur av játtanini til neyðhjálp fer til Ukraina?
6. Halda samráðingarnar millum Føroyar og Evroasiatiska búskaparsamveldið um fríhandilssáttmála fram, hóast nýggju støðuna?
7. Hvønn leiklut hevur føroyska sendistovan í Moskva í samband við ósemjuna millum Russland og Ukraina?
8. Hevur landsstýrið nakrar ítøkiligar ætlanir um at stuðla Ukraina fíggjarliga, búskaparliga, politiskt, diplomatiskt ella á annan hátt í kjalarvørrinum á russisku innrásini?

Svar

Svar til spurning 1:
Føroyar hava ikki fríhandilssáttmála við Ukraina. Yvirskipaðu umstøðurnar fyri útflutning av føroyskum vørum til Ukraina eru tí tær, sum Ukraina hevur bundið seg til í WTO-høpi.

Svar til spurning 2:
Sambært upplýsingum úr Hagtalsgrunninum hjá Hagstovuni hevur gongdin í útflutninginum verið hendan síðani 2013 (í mió. kr.):

2013	*2014*	*2015*	*2016*	*2017*	*2018*	*2019*	*2020*	*2021*
47,8	19,4	8,2	4,6	13,7	40,8	44,9	86,9	104,6

Eisini hevur nakað av útflutningi verið til Ukraina fyrstu seks mánaðirnar av 2022, sbr. upplýsingar úr Hagtalsgrunningum niðanfyri (í mió. kr.):

Januar	*Februar*	*Mars*	*Apríl*	*Mai*	*Juni*
18,4	1,9	4,3	24,1	2,3	3,4

Um hugt verður at, hvørji fiskasløg talan er um, eru størstu mongdirnar av makreli og sild.

Hagtalsgrunnurin hevur ikki hagtøl fyri útflutningin av tænastum til Ukraina.

Svar til spurning 3:
Arbeitt verður miðvíst fyri at betra um møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi at innflyta og útflyta vørur við at virka fyri fríhandilssáttmálum við tey lond, sum føroyskt vinnulív sær møguleikar í.

Tað er kortini fyrst og fremst vinnan í Føroyum, sum avger, hvørjar marknaðir útflutt verður til. Sambært hagtølunum omanfyri er framvegis nakað av útflutningi úr Føroyum til Ukraina, hóast truplu støðuna.

Svar til spurning 4:
Sambært upplýsingum frá Vinnuhúsinum er útflutningurin til Ukraina í løtuni m.a. merktur av, at flutningsleiðirnar gjøgnum Evropa eru broyttar, og at flutningurin tí er drúgvari, enn hann áður hevur verið.

Annars eru formligu treytirnar fyri útflutningin tær somu sum áður, sbr. svar uppá spurning 1. Vinnuhúsið hevur upplýst, at tað annars vanliga ikki eru týðandi markaforðingar fyri útflutningin til Ukraina.

Svar til spurning 5:
Higartil í ár eru 2.750.000 kr. latnar í neyðhjálp í sambandi við kríggið í Ukraina. Hetta er av eini samlaðari játtan í 2022 til menningarsamstarv og neyðhjálp á 12.000.000 kr.

Svar til spurning 6 og 7:
Síðani russisku innrásina í Ukraina í februar hevur ikki verið arbeitt við málinum um fríhandilssáttmála við Evrasiatiska Búskaparsamveldið. Hóast virksemið á sendistovuni tískil er ávirkað av støðuni, hevur sendistovan eina røð av øðrum uppgávum at røkja, harímillum beinleiðis kunning heim. Umstøðurnar kunnu tó broytast, sum møguliga kann gera tað neyðugt at umhugsa støðuna hjá sendistovuni, men fyribils eru ikki ætlanir um aðrar broytingar. Her kann hóskandi verða lagt afturat, at flestu lond leggja dent á at varðveita diplomatisk sambond við Russland, hóast spentu viðurskiftini - harímillum tey norðurlendsku londini.

Svar til spurning 8:
Landsstýrið hevur stuðlað Ukraina við fleiri átøkum og ynskir eisini frameftir at stuðla, har tað ber til. Higartil hevur landsstýrið stuðlað Ukraina fíggjarliga við 2.750.000 kr. av játtanini til neyðhjálp. Eisini hava Føroyar tikið móti fólkum, ið eru rikin úr Ukraina orsakað av krígnum. Nevnast kann harumframt, at landsstýrið, eftir at hava fingið heimild frá Løgtinginum, hevur sett sanksjónir í verk móti Russlandi og Hvítarusslandi, m.a. fyri at vísa Ukraina stuðul.

Uttanríkis- og mentamálaráðið

Jenis av Rana
landsstýrismaður